# Føroysk arbeiðsfólk fingið knívin á barkan

**Arbeiðarafeløgini ætla ikki at lata tað ganga uttan víðari, at føroyingar stovna flakavirki í Lettlandi, sum skal arbeiða føroyskan fisk, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag**

FISKIVINNA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

-– Hetta er ein álvarslig hóttan ímóti tilveruni hjá føroyskum arbeiðsfólki.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, heldur ógvuliga lítið um ætlanina at stovna flakavirki í Lettlandi, sum eisini skal virka føroyskan fisk.

Hann sigur, at hetta er at taka arbeiðið frá føroysku verkafjøldini og tað ætla fakfeløgini ikki at lata sær lynda uttan víðari.

Nøkur Arbeiðarafeløg í Føroyum hava longu tosað saman um støðuna, men enn hava øll ikki verið saman.

– Men tað er púra greitt, at hetta er eitt mál, sum arbeiðarafeløgini fara at taka upp í fullum álvara.

### Kann ikki góðtakast

Hans Joensen sigur, at at arbeiðarafeløgini fara at vísa sína stóru misnøgd við støðuna.

– Vit fara at gera politikarum okkara púra greitt, at hetta er ein gongd, sum vit ikki góðtaka.

Hann vísir á, at her er talan um at virka føroyskan fisk á einum virki uttanlands.

Hvussu arbeiðarafeløgini fara at gera tað, dugur hann ikki at siga, fyrrenn feløgini hava viðgjørt støðuna saman.

– Hetta er ein gongd, sum er rættiliga døpur fyri føroysku verkafjøldina, sum arbeiðir á føroysku fiskavirkjunum. Hóast hetta hevur ligið í luftini longi, er virkið í Lettlandi fyrsta ítøkiliga tiltakið at flyta føroysk arbeiðspláss av landinum á hendan hátt.

Sjálvur ivast Hans Joensen ikki í, at verða ikki stig tikin at forða hesi gongd, fara enn fleiri vinnulívsfólk atflyta virksemið í láglønarlond.

### Hava ov lítið frammanundan

Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelagsigur, at fiskurin undir Føroyum er ogn Føroya Fólks og politikarar kunnu ikki góðtaka, at hann verður fluttur á virki uttanlands at verða virkaður.



*Nú standa vit við skegginum í postkassanum, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

– Tað er í lagi, at vinnulívsfólk gera íløgur uttanlands. Men tað kann ikki góðtakast, at tað skal vera við føroyskari ráværu.

Serliga álvarsligt er hetta, tá ið føroysku virkini hava ov lítið arbeiði frammanundan.

– Høvdu virkin í Føroyum havt nóg mikið av fiski og hevði tað borið til hjá arbeiðsleysum fiskafólkum at fingið arbeiði í øðrum vinnum,var støðan øðrvísi. Men hvørgin av hesum treytunum eru uppfyltar og tí er støðan álvarslig.

Hans Joensen ásannar, at í londum rundanum okkum, er tað vanligt, at arbeiðspláss verða flutt uttanlands.

Men fyri tað skulu vit í Føroyum ikki góðtaka tað.

– Vit hava politikarar, sum eru valdir at vísa samfelagssinni og tað eiga teir eisini at gera.

Hann sigur, at politikarar eiga at bera so í bandi at tað er nóg mikið av arbeiði á føroysku virkjunum, áðrenn vit fara at flyta okkara ráværu av landinum.

Hvussu hetta skal vera, veit Hans Joensen ikki.

– Men vit hoyra aftur og aftur, at føroyska flakavinnan hevur ikki flutt seg úr stað seinastu 30 árini. Ein má ti kundi verið at allir partar settust saman at viðgera, hvussu vit kunnu menna vinnuna fyri at varðveita ráværuna í landinum, áðrenn vit fara at hugsa um at útflyta arbeiðsplássini.

### Meiri átrokandi enn nakrantíð

Sjálvur hevur hann í eini tvey ár roynt at fingið ílag trýpartasamráðingar ímillum fakfeløg, arbeiðsgevarar og politikarar um støðuna á Arbeiðsmarknaðinum. Tá ávaraði eg um at fiskivinnan á landi fór á gravarbakkan.

– Enn er onki hent, tí ongin vil tosa um nakað- og nú standa vit við skegginum í postkassanum.

Tí heldur Hans Joensen, at trýpartasamráðingarnar eru meiri átrokandi enn nakrantíð.

– Nú er útflytingin av arbeiðsplássum byrjað og tí er meiri neyðugt enn nakrantíð, at vit øll seta okkum at tosa saman, sigur Hans Joensen.

## Skúlaorkestur í kongaligari venjing

**Klokkan 14 sunnudagin fara Vágs Skúlaorkestur og Suðurættin at hava konsert í skúlanum í Sumba. Hetta er úrslit av venjingini, ið verður alt vikuskiftið, tí í komandi viku skulu ungu tónleikararnir nevniliga spæla til kongaliga vitjan og til jóansøkuhald**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Suðurættin og Vágs Skúlaorkestur fara á felags venjingarlegu um vikuskiftið í skúlanum í Sumba. Klokkan 14 sunnudagin verður almenn konsert, har úrslitið eftir drúgvu venjingina verður at hoyra.

Næmingar og lærarar í hesum bólkunum gleða seg til komandi vikuna. Spælast skal, tá Suðuroyggin fær kongaliga vitjan fyrst í komandi viku. Og sjálvandi er hetta nakað, ið kann fáa sjálvt tann royndasta blásaran at missa luftina, men næmingarnir eru spentir og gleða seg til avbjóðingina.

Og komandi vikan hevur meira at bjóða, tí á jóansøku eru eisini boð eftir ungu tónleikarunum.

Umstøðurnar til venjing og konsert eru av teim bestu í nýggju hølunum í umvælda og útbygda skúlanum í Sumba. Talan er nú um sera stásilig høli, ið veruliga eru góðir karmar um skúla og tiltøk av ymsum slag.

Og klokkan 14 sunnudagin er tað hornbløstur, sum er á skránni og øll eru vælkomin siga Ulf Nordlund og Oddur Hentze, ið leiða ávíkavíst Vágs Skúlaorkestur og Suðurættina, sum til serstøku uppgávurnar í næstum leggja felags skrá.

## Forsølan til jóansøkufestivalin byrjað

**Forsølan av atgongumerkjum til Jóansøkufestivalin er byrjað og pengar eru at spara, um ein ognar sær atgongumerki í forsølu**

TÓNLEIKUR

*dagfinn@sosialurin.fo*

Nú ber til at ogna sær atgongumerki til jóansøkufestivalin í forsølu. Atgongumerkini fáast á Statoilstøðum kring landið, á Flogvøllinum og á Kunningarstovuni í Vági og í Tangabúðini á Tvøroyri. Nærri er eisini lýst á plakini, hvar keypast kann.

Og pengar eru at spara við at keypa í forsølu, tí har kosta atgongumerkini 165 krónur, meðan tey kosta 200 krónur við dyrnar, sigar fyrireikararnir.

# Aftur av søguligum túri

**Hósmorgunin klokkan 10 kom sluppin Johanna TG 326 aftur á Vág, eftir at hava verið søguligan túr. Nógv fólk tók ímóti á bryggjuni**

SLUPPTÍÐINDI

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hósmorguin klokan 10 kom Johanna TG 326 aftur á Vág, eftir at hava verið søguligan túr. 60 ár eru síðani seinni heimsbardagi endaði og gjørdi Johanna í hesum sambandi søguligan túr. Johanna sigldi vandasjógv øll krígsárini og leitaði nú aftur á leiðirnar, sum tó nú eru heldur vandaleysari.

Fyrst fór Johanna til Íslands eftir einum tonsi av fiski, eins og gjørt var tá. Síðani gekk leiðin til Aberdeen at selja fiskin. Soleiðis skuldi túrurin minnast teir, ið sigldu vandasjógv stríðsárini og allar teir, ið fórust í hesi sigling.



Tá Joahnna kom á Vág við manning, ið sang "Leið meg einaferð enn út á dekkið", var nógv fólk á bryggjuni. Óli Holm helt røðu, sálmar vóru sungnir og síðani varð farið niðan til Minnisvarðan at leggja krans.

Skipari á ferðini var Hans Joensen, Hans í Líðini, sum er abbasonur Jakke í Líð, sum var ein av skiparunum, sum førdi Johannu TG 326 undir krígnum. Mangir av manniningi, ið annars kemur úr øllum Føroyum, eru gamlir sluppmenn og á manningarlistanum sæst, at tann elsti er føddur í 1920. Móttøkan hevur verið stórfingin har Johanna er komin á hesi søguligu ferð og áhugin hevur verið stórur fyri ferðini. T.d. hava íslendskir sjónvarpsmenn fylgt ferðini og gera teir dokumentarfilm um sluppina og søguligu ferðina.

Ferðin, ið hevur vart einar tvær vikur, hevur gingið væl, hóast sjaskveður hevur verið av og á, men tá Johanna kom at bryggju hósmorgunin, skein sólin av tí fagrasta.

Meira fæst at vita um ferðina við at leita sær á heimasíðuna www.johanna.fo